# Jovevic til TB

Alexandar Jovevic, sum tey bæði seinastu kappingarárini hevur leikt við NSÍ og Skála, fer komandi ár at spæla fótbólt á Tvøroyri.

Hetta skrivar Dimmalætting hósdagin. Við blaðið sigur formaðurin í TB, Sofus Laðanberg, at teir meta tað sum neyðugt at styrkja um hópin, nú felagið er flutt upp í bestu deildina, og at tilgongdin av Jovevic er ein liður í hesum arbeiði.

Í fjør hevði TB útlendskan styrk í Emmanuel Larbi, Daniel Nyarko og Predrag Zivkovic. Hesin seinasti nevndi hevur verið í Føroyum síðani 2000, og er tí at rokna sum føroyingur í fótbóltshøpi, so tað tykist væl møguligt, at TB fer at knýta enn ein útlendskan leikara afturat liðnum í vetur.

**-jm**

# Javnleik móti Albania

Føroyska talvlandsliðið telvaði mikudagin sín sætta dyst á talvolympiaduni á Mallorka. Hesaferð var móstøðuliðið Albania, sum er styrkismett sum nummar 62. Tað eru 25 pláss frammanfyri Føroyar.

Met hetta løgdu føroysku telvararnir líka í. Bæði Hans Kristian Simonsen á øðrum og IM John Rødgaard á fjórða borði vunnu síni talv móti telvarum, sum vóru væl hægri styrkismettir. Martin Poulsen mátti á fyrsta borði lúta fyri einum stórmeistara, sum hevði omanfyri 2500 ratingsstig, og á triðja borði tapti Olaf Berg somuleiðis sítt talv.

Javnleikur var tó eitt sera gott úrslit hjá føroyska liðnum, sum nú er á 82. plássi í kappingini. Hetta eru fimm pláss omanfyri styrkismetingina.

**-jm**

# Gamal kenningur verður venjari í Fuglafirði

**Í Fuglafirði verður vónað, at manningin verður umleið tann sama, nú teir ætla at toga seg longri fram, sum hon var, tá ið tað eydnaðist teimum at sleppa undan niðurflytingini**

ÍF FYRIREIKINGAR
*Jóannes Hansen*


*Hóast hann er ein av bara tíggju venjarum, sum hevur hægstu føroysku venjaraútbúgvingina, so hevur hann av arbeiðsávum ikki vant lið í fremstu deildini síðani 1998*

Tað verður ein gamal kenningur í Fuglafirði og ÍF, sum fer at hava ábyrgdina, tá ið fuglfirðingar eftir ársskiftið fara at leggja til brots í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið. Petur Simonsen, sum býr í Havnini, men er ættaður úr Fuglafirði, og ÍF skrivaðu týskvøldið undir sáttmála, sum sigur, at Petur tvey tey næstu árini skal vera venjari hjá ÍF. Tað skrivaði ÍF heimasíðan mikudagin.

– Uppgávan kennist bæði spennandi og sum ein stór avbjóðing. Eg havi ikki verið venjari í bestu deildini síðani í 1998. Men eg havi havt samband við venjarar og fótbóltsheimin, og tað er mín fatan, at talan hevur verið um stórar broytingar síðani tá, og ikki minst í Fuglafirði eru teir málrættaðir og taka uppgávuna í stórum álvara. Tað er í hvussu so er fatanin, sum eg havi fingið, tá ið vit hava tosað um samstarvið, sum vit nú hava gjørt av at fara undir. Eg haldi, at tað eru møguleikar í spælarunum, sum vóru við í ár, og nevndin og stuðulsfelagið hava sett út í kortið, og teir kenna fyritreytirnar.

Hetta sigur Petur Simonsen. Hann er ikki ókendur í ÍF. Har hevur hann bæði verið formaður og venjari. Hann var formaður frá 1978 og til 1982. Tað var um ta tíðina, tá ið vøllurin í Fuglafirði varð gjørdur av nýggjum. Petur hevur í tveimum skiftum verið venjari hjá ÍF. Fyrra skeiðið var 1983, 1984 og 1985, og seinna skeiðið var í 1996 og í 1997. Í 1998 var Petur venjari á Toftum, og síðani tá hevur hann ikki verið venjari í fremstu røð.

Petur er ein av tíggju venjarum í Føroyum, sum hevur tað sonevndu elituvenjara útbúgvingina. Hann hevur tey seinnu árini saman við fleiri av hinum elituvenjarunum arbeitt sum instruktørur, og samstundis hevur hann verið venjari í øðrum deildum enn tí fremstu. Í ár hevur hann havt ábyrgdina av unglingunum og 3. deildarliðnum hjá. Í 1999 var hann venjari hjá HB unglingunum og 2. deildarliðnum, og í 2000 vandi hann smádreingirnar og dreingirnar hjá EB/Streymi.

## Sama fólkið

Rúni Petersen, formaður í ÍF, sigur seg vera fegnan um, at venjaraspurningurin fyri tvey tey næstu árini er fingin upp á pláss.

– Tá ið vit í fjør fluttu upp í bestu deildina, settu vit okkum sum mál, at trý tey næstu árini skuldu nýtast at fóta okkum í bestu deildini. Millum fyritreytirnar, ið skulu vera upp á pláss, eru, at venjaraspurningurin og spælaraspurningurin eru loystir. Nú er Petur Simonsen vorðin venjari, og vit eru fegnir um, at hetta er komið upp á pláss, nú vit tosa við spælararnar. Vit halda, at tað eru møguleikar fyri, at liðið, sum spældi í ár, kann gerast uppaftur betri, og tí vóna vit, at somu spælarar, sum spældu við í ár, eisini fara at vera við næsta ár. Vit vóna eisini, at tað fer at eydnast at fáa onkran spælara afturat. Enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt um hetta, men vit halda, at tað sær hampuliga gott úr, sigur Rúni Petersen, sum í gjár ikki vildi vera meiri ítøkiligir viðvíkjandi spælarunum.

Tá ið ÍF í fjør tryggjaði sær uppflyting til bestu deildina, var Sigfríður Clementsen venjari. Hann helt fram eftir ársskiftið, men í summar varð hann sagdur úr starvinum. Tá tók Petur Mohr liðið á seg, men nú hevur nevndin so aftur gjørt av at skifta venjara.

# Javnt í botnuppgerð

**Randers er framvegis aftast, og mikukvøldið eydnaðist tað ikki Esbjerg at sleppa leyst av botninum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tá ið tað síðst í juli varð farið undir nýggja kappingarárið í superliguni, bar tað ikki til at fáa uppgerðina í Randers millum uppflytararnar í superliguna, Randers FC; og Esbjerg avgreidda. Tað komst av, at Esbjerg spældi í Intertoto Cup.

Mikukvøldið varð útsetta uppgerðin endiliga fingin frá hondini í illfýsnum heystarveðri í Randers. Úrslitið gjørdist 1-1, eftir at heimaliðið, sum fyrst hevði vindin og regnið í ryggin, hevði verið á odda í steðginum. Úrslitið ber við sær, at Randers framvegis er niðast, og at tað ikki eydnaðist Esbjerg at sleppa so leyst av botninum, sum bronsuvinnararnir í fjør høvdu vónað, at tað fór at gera í útsetta dystinum.

Tólvta umfarið verður spælt í vikuskiftinum. Leygardagin er ein dystur á skránni. Tá fer botnliðið at fáa vitjan av oddaliðnum, Brøndby. Sunnudagin sær skráin soleiðis út: AaB-Herfølge, Esbjerg-AGF, FCM-FCN, OB-Silkeborg og FCK-Viborg.

# Allir føroyingarnir eru í toppinum

**Hjalgrím Elttør var aftur í ferðalagnum, men føroyska íslettið á vøllinum í Odense var ikki stórt, tá ið Fremad Amager mikukvøldið vann tryggan sigur á botnliðnum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað gongur so væl, sum tað kann bera til at ganga, hjá feløgunum í næstbestu deildini í Danmark, har føroyskir spælarar eru við í kappingini um plássini á besta liðnum.

Mikukvøldið varð ein útsettur dystur á skránni. Nú hava øll feløgini spælt ellivu landskappingardystir í part, og sæð frá føroyskum sjónarhorni, sær støðutalvan áhugaverd út. Horsens, sum hevur Johan B. Hansen á liðnum, er oddalið við 23 stigum, og stavn um stavn í kappingini um næstfremsta plássið, eru Fremad Amager, sum hevur tríggjar føroyskar spælarar, og Frem, sum sunnudagin hevði Jón Róa Jacobsen sum tvífaldan málskjútta (tvær ferðir málskjútti við høvdinumaftaná hornaspørk), og sum mánadagin á heimasíðuni hjá felagnum varð kosin besti spælarin sunnudagin.

Gunnar Nielsen er hvørja ferð eykamálverji hjá Frem.

## Lítil leiklutur

Útsetti dysturin mikukvøldið var á Odense stadion, har Fremad Amager vitjaði botnliðið Dalum. Nýggi venjarin hjá Fremad Amager, Benny Johansen, hevði givið Hjalgrími Elttør boð um at vera við í Odense ferðini saman við Andrew av Fløtum og tólv øðrum spælarum. Í fleiri vikur hevur Hjalgrím annars ikki verið partur av besta liðnum.

Eftir málleysan 1. hálvleiki vann Fremad Amager 3-1. Sigurin bar við sær, at Fremad Amager flutti fram á næstfremsta plássið. Lagið í felagnum er ógvuliga gott. Í fjør stríddust teir alt kappingarárið fyri at sleppa undan niðurflytingini, og hóast teir í summar vónaðu, at tað hesa ferð skuldi roynast betri enn tað, so hevur eingin droymt um, at felagið skuldi blanda seg í stríðið um uppflyting. Enn er langur vegur á mál, og tað fer neyvan at eydnast felagnum at varðveita framúr góðu støðuna. Men tann løtan, sum er góð, er ikki ring, sum tað plagar at verða tikið til.

Synd er at siga, at føroyski leikluturin var serliga stórur á Fremad Amager liðnum mikukvøldið. Hjalgrím Elttør var á beinkinum allar 90 minuttirnar, og fyri fyrstu ferð í fleiri umfør taldist Andrew av Fløtum ikki millum teir fyrstu ellivu. Hann varð settur inn í álopið, tá ið tað restaðu trettan minuttir. Tað var akkurát, tá ið Fremad Amager hevði økt um munin til 3-1.

Leygardagin skal Frem spæla á heimavølli móti Næstved. Sunnudagin skal Fremad Amager í torføran útidyst móti SønderjyskE, meðan Horsens skal spæla á heimavølli móti AB.






KT-Kleking er ein vinnumennandi verkætlan undir KT-ætlan Vinnumálastýrisins, har karmar verða skaptir fyri menning av nýggjum KT-fyritøkum. KT-klekingardepilin er partur av Menningarstovuni.

Summi hugskot eru verd at goyma...

Gongur tú við einum frálíkum KT-hugskoti, men veist ikki hvussu tú skalt fáa gjørt tað til veruleika? So er KT-klekingardepilin nakað fyri teg.
Set teg í samband við okkum so vi kunnu hjálpa tær við at gera eina lýsing av verkætlanini. Verður hugskotið hildið at vera burðardygt, kanst tú fáa innivist í KT-klekingardeplinum á Bryggjubakka. Her fært tú atgongd til skrivstovupláss, løn og hjálp til menning av tíni egnu fyritøku, ið skal standa sum ánari av hugskotinum.

Í KT-klekingardeplinum verður tú partur av einum kveikjandi umhvørvi, har tú kanst fáa gleði av royndum og førleikum hjá øðrum, ið eru í júst somu støðu sum tú. KT-Kleking hjálpir tær eisini at finna váðafúsar íleggjarar og samstarvsfelagar.

KTKLEKING

KT-Kleking · Postboks 259 · 110 Tórshavn · Tel. 35 31 17 · kleking@kleking.fo · www.kleking.fo

Venjingarskúlin

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv til avlopstímar at byrja sum skjótast.

Løn sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. november.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 316317 ella 213502.

Skúlastýrið við Venjingarskúlan
v/ Gunri Johannesen
Blankagøta 10
100 Tórshavn

Feng Shuí
v/ Sigrid Sighvatsson

Í VÁGUNUM 23. OKTOBER
Í SUÐUROYNNI 24. OKTOBER



Er húsið á tremur...

...við gomlum klæðum, vasum, leikum, elligomlum skúlabókum og málingarestum?

Ella við posum við klæðum "sum tú fert at gera í stand", men sum mangla bert ein knapp, eitt snarlás ella hava blettir?

Hevur tú meiri klæðir at mála í, enn nakar málari?

Ella hevði tú kunna hugsað tær at hoyrt, hvussu tú kanst seta litir saman?

Kom og hoyr Sigrid greiða frá, hvussu tú ruddar teg til meira orku og hvussu tú kanst seta litir saman.

Tilmelding á heimasíðu okkara www.synergi.fo ella umvegis teldupost, fax. ella telefon! Avmarkað pláss!

· Á Hotel Vágum 23. okt. kl. 16⁰⁰ -19⁰⁰ – *Fá pláss eftir!*
· Í Skúlahøllini í Trongisvági 24. okt. kl. 13³⁰ -16³⁰
(verður gjøgnumført um nóg nógv tekna seg innan 22. okt.)

TEAM85

www.synergi.fo · synergi@synergi.fo · tel 22RING (227464) · 22KIMA (225462) · Fax 322 355 Synergi

GER KVETTI
Opel Astra 1600 bíliga til sølu



Árg 97 · km. 85.000

Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.

Til sølu vegna flyting

Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com

